tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 21.12.2021 kl. 17:30
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 80/21 | 21/00485-1 | Skúlastýrið -Árligur fundir millum skúlastýrið og TVK (2021) |
| 81/21 | 21/00695-2 | Felagskommunal reglugerð um óljóð frá skipum |
| 82/21 | 21/00567-1 | Framleiðslugjald vatn og vørugjald - Tvøroyrar havn |
| 83/21 | 21/00617-2 | BVT Suðuroyar Barnaverndartænasta -fíggjarætlan 2022 |
| 84/21 | 21/00637-3 | Føroya Eftirskúli -umsókn um stuðul til skúlaárið 2021/2022 |
| 85/21 | 21/00664-1 | Tilbúgving -keyp og umvælingar av stigabili 2020/2021 |
| 86/21 | 21/00708-1 | Tilbúgving -tilmælið um keyp av átaksbili til Hvalbiar kommunu |
| 87/21 | 21/00693-1 | Eykajáttanir -flyting millum íløgu og rakstrarstøða 2021 |
| 88/21 | 21/00734-2 | BHS Bú- og Heimatænastan í Suðuroy -Ársroknskapur 2020 |
| 89/21 | 21/00738-1 | BHS -Fíggjarætlan 2022 fyri Bú- og Heimatænastuna |
| 90/21 | 21/00382-2 | Posta -Leigusáttmáli um avgreiðslubyggning matr.nr. 374 í miðbýnum (Posta-bygningurin) |
| 91/21 | 21/00749-1 | Tilbúgving -keyp av vatn tangabili |
| 92/21 | 21/00718-1 | Trongisvágsskúli & Ítróttarhøllin -hitaskipan (Oljufýr / Oljuketil) |
| 93/21 | 21/00751-1 | Býráðsskrivstovan -dagføring av kaffi- og matstovu |

| | | |
|---|---|---|
| 94/21 | 20/00302-11 | Umsókn um byggiloyvi til íbúðir á matr. nr. 208av - Bústaðir - MTV |
| 95/21 | 21/00742-2 | [redacted] Lukka mál |
| **Til kunningar** | | |
| 35/21 | 21/00035-1 | Skattatøl 2021 |
| 36/21 | 21/00376-18 | Umsókn um byggiloyvi í Heiðatrøðini |
| 37/21 | 21/00511-2 | Suðuroyar sløkkilið -Umsokn um stuðul til keyp av útbúnaði send Betri Trygging 2021 |
| 38/21 | 21/00694-1 | SEV -Aðalfundur 2021 |
| | | |

Kristin Michelsen lesur upp skránna og spyr um viðmerkingar eru til hesa.

Súsanna Bertholdsen ynskir viðmerkt at hon ynskir á skrá málið at velja stýrislimir í BHS "Bú- og heimatænastuna" fyri 8´da ferð av nýggjum, eftir at Kommunalaeftirlitið hevur ógilda valið av stýrislimum hjá Tvøroyrar kommunu. –Súsanna Bertholdsen kunnar um, at skriv er komið frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, ið ger vart við at kommunustýrislimir hava rætt til at fáa málið á skrá, har kunna verður, at kommunustýrið hevur skyldu til at avgreiða hetta mál av nýggjum.

Kristin Michelsen ynskir viðmerkt at málið, er ikki á skrá tí at eftirmetingin frá Kommunufelagnum / aðalráð enn ikki er liðug

Súsanna Bertholdsen spyr um tað ber til at fáa kunning um støðuna hjá Kommunufelagnum.
Kristin Michelsen upplýsir, at hann skal fáa hetta avgreitt.

Til støðutakan

**80/21**
**21/00485-1 Skúlastýrið -Árligur fundir millum skúlastýrið og TVK (2021)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 08.06.2021 | 43/21 |
| 2 Býráðið | 16.06.2021 | 45/21 |
| 3 Býráðið | 21.12.2021 | 80/21 |

**Málslýsing: (kommunustjórin 04.06.2021)**
Tvøroyrar kommuna hevur tveir regluligur fundir við skúlastýrið og skúlaleiðsluna, at lýsa og viðgerða mál, ið hoyra skúlanum til.

Skúlastýrið valskeiðið (2021-2024) er:
- Sára Ellendersen, Forkvinna
- Regitsa Johannesen, Næstforkvinna
- Annika Jónsveinsdóttir, Foreldraumboð
- Mariann Mikkjalsdóttir, Skúlaumboð
- Alvi Mortensen, Kommunuumboð
- Bjarni Hammer, Kommunuumboð

**Mentanarnevndin 08. juni 2021:**
Einmælt samtykt at kommunustjórin samskiftir við skúlastjóran um at fáa í lag forfund við skúlaleiðslu og skúlastýrið til komandi býráðsfund. Og um hetta ikki ber til, at áseta forfund til septemberfundin.

**Býráðið 16. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Kommunustjórin 08.12.2021**
Avtala er gjørd við skúlastjóran og innbjóðing er send til forkv. í skúlastýrinum um at skúlaleiðslan og skúlastýrið møta á fund við býráðið tórsdagin 16. desember, at umrøða mál sum hoyra skúlanum til.

**Býráðið 21. december 2021:**
Fundurin var hildin kl. 16.00 -Málið var umrøtt og kunnað.

**81/21**
**21/00695-2 Felagskommunal reglugerð um óljóð frá skipum**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 06.12.2021 | 45/21 |
| 2 Býráðið | 21.12.2021 | 81/21 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 22.11.2021**
Arbeiðið at orða eina felagskommunala reglugerð um óljóð frá skipum er nú komið at mál.

Fríggjadagin 19. november 2021 varð reglugerðin løgd fram á borgarstjórafundi í Kommunufelagnum. Semja var um at senda øllum kommununum reglugerðina við umbøn um at seta málið á skrá til fyrstkomandi kommunustýrisfund. Eisini mælti borgarstjórafundurin øllum kommunum til at samtykkja reglugerðina í óbroyttum líki.

Kommunufelagið mælir tí øllum kommunum til at:

1. Seta felagskommunalu reglugerðina á skrá á fyrstkomandi kommunustýrisfundi, og
2. Samtykkja reglugerðina í (innihaldsliga) óbroyttum líki

***Stutt málslýsing:***
*Endamálið við felagskommunalu reglugerðini um óljóð á skipum er at áseta felags reglur um lágfrekvent motorljóð og um óneyðugan larm frá skipum, sum liggja við bryggju í kommunalari havn.*

*Eftir samskifti millum kommunal umboð og landsins umhvørvismyndugleika eru felags markvirði ásett fyri lágfrekventum motorljóðið. Markvirðini verða sett í verk 1. januar 2022 og eru stigvíst lækkandi komandi trý árini.*

*Felags skráseting fyri brot á reglugerðina verður gjørd og í evsta føri kunnu skip fáa boð um, at tey ikki sleppa í nakra føroyska havn. Reglugerðin verður umsitin í felag millum havnirnar og havnarmyndugleikarnir skulu tí halda seg til mátingar o.a. hvør hjá øðrum. Tað merkir millum annað, at verður eitt skip víst úr einari havn vegna ov høgt motorljóð, so sleppur skipið ikki inn í aðra havn uttan so at grundleggjandi fortreytir eru broyttar.*

*Fyri Kommunufelagið hevur okkara havnarnetverk staðið fyri arbeiðinum við reglugerðini. Í netverkinum eru umboð fyri allar stóru (ídnaðar)havnirnar í Føroyum og skrivstovuna hjá Kommunufelagnum.*

**Lógargrundarlag: Kommunustýrislógin**

**Fíggjarligar avleiðingar: ókent**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Vinnu- og havnanevndin 06. december 2021:**
Vinnu- og havnanevndin hevur viðgjørt málið í nevndini. Einmælt samtykt at taka undir við uppskotinum og beina málið í býráð.

**Býráðið 21. december 2021:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá Vinnu og havnanevndini og seta í gildið reglugerðini um óljóð á skipum, galdandi fyri Tvøroyrar havn.

**82/21**
**21/00567-1 Framleiðslugjald vatn og vørugjald - Tvøroyrar havn**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.09.2021 | 51/21 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 11.10.2021 | 36/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 63/21 |
| 4 Vinnu- og havnanevndin | 06.12.2021 | 46/21 |
| 5 Fíggjarnevndin | 21.12.2021 | 89/21 |
| 6 Býráðið | 21.12.2021 | 82/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin)**
Umsitingin er komin eftir, at framleiðsluvirkir, sum virka í kommununi ikki verða kravd eftir framleiðslugjaldið/flutningsgjaldi fyri vøru eftir vegakervinum.

**Lógargrundarlag:** Kommunufultrúin -

Ásetingar byggja á avgerðarrætt býráðsins um at áseta takstir vm. fyri Tvøroyrar havn, hetta vísandi til avtøkuna av løgtingslóg nr. 45 frá 04. apríl 2000 um "Skipa- og vørugjøld vm" og harvið kunngerð nr. 112 frá 05. juli 1995 um skipa- og vørugjøld fyri havnir og bryggjur í Føroyum, sum annars bygdi á løgtingslógina frá 1875. "om udfærdigelse af regelmentariske bestemmelsen af havne"

**Fíggjarligar avleiðingar:** Fíggjarætlan –Rakstraræltan Tvøroyrar havn

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 27. september 2021:**
Fíggjarnevndin tekur undir við, at tørvur er á at dagføra rakstraræltaninar hjá Tvøroyrar havn. Einmælt samtykt at beina málið í Vinnu- og havnanevndin.

**Vinnu- og havnanevndin 11. oktober 2021:**
Nevndin ynskir at broyta vatngjaldið til skipini frá 12kr/tons til 18kr/tons. Málið verður beint í fíggjarnevndina.
Kannað verður hvønn møguleika at vørugjald á fluting av kaiini og eftir vegnum. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:**
Einmælt samtykt at málið verður útsett til ein seinni fund í fíggjarnevndini, og Vinnu og havnanevndin arbeiðir víðari við at greina uppskotið.

**Tekniskur leiðari 02-12-2021:** Forkvinna í Vinnu- og havnanevndini [V&HN] ynskir at málið um gjøld til veiting til skip kemur á skrá. Samstundis er áheitan komin frá Tvøroyrar Havn, har teir mæla til at V&HN mælir býráðnum at samtykkja eina prísbroyting á fesk-vatn til skip frá 12kr/t til 15kr/t.
Prísurin er ikki tillagaður í nógv ár, og kommunan hevur gjørt stórar íløgur í vatnkervið.
Jón Bogi Guttesen/ havnastjóri hevur kannað hvat aðrar havnir taka fyri vatn, og tað liggur millum 15-21kr/t. Áheitan er komin við teldupostið 01.12.2021.

**Lógargrundarlag:** sí málslýsing.

**Fíggjarligar avleiðingar:** sí málslýsing

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Vinnu- og havnanevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Vinnu- og havnanevndin 06. december 2021:**
Nevndin hevur viðgjørt málið um kostnað av drekki-vatni. Nevndin hevur einmælt samtykt at fremja eina prísbroyting á fesk-vatn til skip frá 12kr/t til 18kr/t. Málið verður beint í fíggjarnevndina og møguliga býráði til støðutakan.
Vinnu- og havnanevndin letur fíggjarnevndina taka støðu til nær prísbroytingin verður sett í verk.

**Fíggjarnevndin 21. december 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Havnanevndini at áseta vatngjald á kr. 18,-/ton. Fíggjarnevndin mælir til at gjalið fyri vatn verður galdandi frá 1. januar 2022. Fíggjarnevndin mælir, til at havnanevndin tekur upp tilviðgerðar framleiðslugjaldið/flutningsgjaldið

**Býráðið 21. december 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Fíggjarnevndini.

**83/21**
**21/00617-2 BVT Suðuroyar Barnaverndartænasta -fíggjarætlan 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 54/21 |
| 2 Býráðið | 28.10.2021 | 62/21 |
| 3 Býráðið | 21.12.2021 | 83/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin)**
Umsitingin hevur móttikið uppskot til fíggjarætlan fyri 2022, fyri BVT, Barnaverndartænastuna, frá leiðaranum Jónleyg Eyðunsson.

Fíggjarætlanin er viðgjørd og samtykt á stýrisfundi í BVT hin 18. okt., við viðmerking frá fíggjarleiðarinum hjá Tvøroyrar kommunu Amy Bech, at 900tkr. eru løgt aftur at fyrra uppskotinum, hetta tí at barnaheimsplássini vóru ikki tald við í fyrra uppskotinum.

Fíggjarætlanin 2022 javnvigar við kr. 9.219.949,-, parturin hjá Tvøroyrar kommunu er 37,87%, svarandi til kr. 3.487.674,-.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 26. mars 2021

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2022, §2.21.32 Barnavernd, avseta kr. 3.487.674,-

*(FÆ2021, var avsett kr. 2.54 mió., umframt eykajáttan á kr. 632tkr.)*
*Orsøkin til eykajáttan FÆ2021, er øktar lønarútreiðslur, til konsulentar, samsýning til fosturforeldur, stuðlar, sálarfrøðing, og fyrisiting.*

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:**
Einmælt samtykt, málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Atkvøtt var um fíggjarætlanina 2022 fyri BVT, barnaverndartænastuna, einmælt samtykt.

**Kommunustjórin 17. november 2021:**
Seinna viðgerð av fíggjarætlan fyri BVT verður hervið latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 21. december 2021:**
Seinna viðgerð av fíggjarætlan fyri BVT einmælt og endaliga samtykt.

**84/21**

**21/00637-3 Føroya Eftirskúli -umsókn um stuðul til skúlaárið 2021/2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 09.11.2021 | 98/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 75/21 |
| 3 Býráðið | 25.11.2021 | 71/21 |
| 4 Býráðið | 21.12.2021 | 84/21 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 31.10.2021**
Umsitingin hevur móttikið umsókn um stuðul frá Føroya Eftirskúla til virksemið skúlaárið 2021/2022.

Í Umsókinini verður upplýst at tørvur er á stuðul svanarndi til kr. 400.000,- Peningurin skal nýtast til hølisleigu, ljós og hita kr. 200.000,-, og aðrar kr. 200.000,- til at Føroya Eftirskúli kann halda fram sítt nýskapandi virksemi.

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin og Løgtingslóg nr. 83 frá 17. mai 2000 um eftirskúlar.

*Kapittul 6*

*Fígging av rakstri og íløgum*

*§ 17. Virksemið hjá eftirskúlunum verður lutvíst fíggjað við stuðli, sum landsstýrismaðurin og kommunurnar útvega. Írestandi fígging skal útvegast við næmingagjaldi og/ella privatum stuðli.*

*Stk. 2. Landskassans partur er:*

*1. Til allar rakstrarútreiðslur, heruppií útreiðslur til løn til skúlaleiðara, lærarar og onnur starvsfólk, ljós og hita, leigu, viðlíkahald, undirvísingartilfar, trygging o.s.fr, verða latin í mesta lagi 70% av kostnaðinum.*

*2. Til keyp av húsum, bygging ella um- og uppíbygging av húsum til eftirskúla verða eftir landsstýrismansins góðkenning sum rentu- og avdráttarfrítt lán latin í mesta lagi 50% av virðinum eftir virðismeting.*

**Fíggjarligar avleiðingar: Ongin játtan er avsett á FÆ2021**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 09. november 2021:**
Pól Arni Holm, skúlastjóri greiddi frá, at tá næmingatalið er komi uppá 25 næmingar ber Føroya Eftirskúli seg uttan stuðul frá Tvøroyrar kommunu. Tilmeldanin til komandi skúla ár er 13 næmingar, og útlitini eru góða fyri at talið veksur við tíðini. Til allar rakstrarútreiðslur, heruppií útreiðslur til løn til skúlaleiðara, lærarar og onnur starvsfólk, ljós og hita, leigu, viðlíkahald, undirvísingartilfar, trygging o.s.fr, verða latín í mesta lagi 70% av kostnaðinum frá landinum landinum.

Einmælt samtykt at játta stuðul til Føroya Eftirskúla á kr. 400.000,- samb. umsókn frá Føroya Eftirskúla. Víst verður til fund við mentamálaráðið 07. juli 2021 við luttøku av landsýrismannin og umboð í mentamálaráðnum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. november 2021:**
Einmælt samtykt –Játtanin verður fíggja sum eykajáttan av innistandandi –málið verður beint í býráðið til tvinnar viðgerðir

**Býráðið 25. november 2021:**
Einmælt samtykt við fyrru viðgerð –málið skal hava tvinnar viðgerðir.

**Býráðið 21. december 2021:**
Seinna viðgerð av eykajáttan til Føroya Eftirskúla, einmælt og endaliga samtykt.

**85/21**
**21/00664-1 Tilbúgving -keyp og umvælingar av stigabili 2020/2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tilbúgvingarnevndin (Brunanevndin) | 23.11.2021 | 6/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.12.2021 | 90/21 |
| 3 Býráðið | 21.12.2021 | 85/21 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 12.11.2021**
Eftir tilmælið frá átaksleiðaranum í sløkkiliðinum í sunnara og noðrðari hevlt av Suðuroynni, samtykti allar kommununum í Suðuroynni í 2020 at keypa 20 ár gamla stigabilin frá Tórshavnar kommunu fyri kr. 350.000,-, umframt at játta kr. 350.000,- til umvælingar av sama.

Upplýst var av báðum átaksleiðaranum, at bilurin var í góðum standi, men tørvur var at fremja eftirlit á sløkkiútgerðina og stigan á bilinum. Eftirlitið skuldi gerast uttanlanda av fyritøkuni Bronto Skylift, og ljóðaði tilboði (dagf. 26.10.2020) uppá DKK. 356.070,-.

Stigabilurin er umvældur og afturkomin til Suðuroynna, og ljóðar fakturin fyri umvælingina DDK. 834.557,-

**Lógargrundarlag: -kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar: -eykajáttan**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Tilbúgvingar- og brunanevndini til hoyringar.

**Tilbúgvingarnevndin (Brunanevndin) 23. november 2021:**
Anfinn Leo upplýsti at átaksleiðarin í sunnari helvt hevur samskift við fyritøkuna, sum hevur umvælt stigabilin, og hevur gjørt allar avtalur hesum viðvíkjandi. Anfinn Leo upplýsti, at hann var kunnaður um meirkostnaði í mai mnd. í ár, og at hann kunnaði hetta víðari til tekniskaleiðaran.

Kristin Michelsen kunnar um samskiftið millum átaksleiðaran í sunnari helvt og fyritøkan, sum hevur umvælt stigabilin.

Anfinn Leo kunnaði um, at hann hevur skilt á átaksleiðaranum í sunnari helvt, at Vágs Kommuna mælir til at brúka part av stuðulsjáttanini frá Betri Stuðulsgrunninum til umvælingina av stigabilinum, nú umvælingin er blivin væl meira enn samtykt av kommununum.

Tilbúgvingarnevndin mælir einmælt til, at meirkostnaðurin av umvælingini av stigabilinum verður viðgjørd sum møgulig eykajáttan hjá hvørjari kommunu sær. Og at játtanin frá Betri stuðul skal ikki brúkast til umvælingina av stigabilinum.
**Einmælt samtykt, og verður tilmælið lagt til samtyktar hjá hvørjari kommunu sær**

**Kommunustjórin 07.desember 2021**
Til støðutakan hjá fíggjarnevndini og møguliga býráðnum er tilmælið hjá tilbúgvingar- og brunanevndini.

1. Tilbúgvingarnevndin mælir einmælt til, at meirkostnaðurin av umvælingini av stigabilinum verður viðgjørd sum møgulig eykajáttan hjá hvørjari kommunu sær.
2. Veitan av eykajáttan til umvæling av stigabili, samb. býtislykli tal av borgarum í Suðuroynni.

| KOMMUNA | Fólkatal okt.21 | Býtislykil % | Umvælingar kostn./eykajáttan Kr. |
|---|---|---|---|
| TVØROYRAR KOMMUNA | 1.766 | 38 | 314.652 |
| HVALBIAR KOMMUNA | 679 | 14 | 120.979 |
| FÁMJINS KOMMUNA | 83 | 2 | 14.788 |
| HOVS KOMMUNA | 100 | 2 | 17.817 |
| PORKERIS KOMMUNA | 321 | 7 | 57.193 |
| VÁGS KOMMUNA | 1.376 | 29 | 245.164 |
| SUMBIAR KOMMUNA | 359 | 8 | 63.964 |
| | **4.684** | **100** | **834.557** |

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 21. december 2021:**
Einmælt samtykt at heita á Átaksleiðaran / Vágs kommuna at samráðast um ein lægri prís fyri umvælingina.

**Býráðið 21. december 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Fíggjarnevndini.

**86/21**

**21/00708-1 Tilbúgving -tilmælið um keyp av átaksbili til Hvalbiar kommunu**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.12.2021 | 91/21 |
| 2 Býráðið | 21.12.2021 | 86/21 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 02.12.2021**
Tilbúgvingarnevndin mælir til á fundi hin 23. Nov.2021 at ein átaksbilur verður keyptur, sum verður staðsettur at vera í Hvalbiar Kommunu, og at allar kommunur gjalda samb. býtislýkil eftir fólkatalinum og samb. samstarvsavtaluna.

Átaksleiðarin hevur innheinta tilboð uppá ein hóskandi átaksbil, sum kemur at kosta í mesta lagið kr. 300.000,- ink. MVG.

Til støðutakan er keyp av átaksbili og veitan av fígging til sama.

**Fejl! Ugyldig kæde.Lógargrundarlag:** Tilbúgvingarlógin, samstarv um tilbúgving

**Fíggjarligar avleiðingar:** Fyri Tvøroyrar kommunu kr. 209.407,- , ongin játtan avsett

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndin og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 21. december 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá tilbúgvingar- og brunanevndini

**Býráðið 21. december 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Fíggjarnevndini

**87/21**
**21/00693-1 Eykajáttanir -flyting millum íløgu og rakstrarstøða 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.11.2021 | 77/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.12.2021 | 92/21 |
| 3 Býráðið | 21.12.2021 | 87/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjorin 22.11.2021)**
Fíggjardeildin er ikki liðug við uppgerðini av eykajáttan og flytan millum játtanir fyri 2021.

Roknskapurin fyri 2021 framroknað vísir avlop á kr. 11,0 mió. fyri rakstur og íløgur.

Meirnýtsla er tó á nøkrum greinum innan:

- §1 Kommunalafyrisitingin kr. 1,7 mió.
- §2 Almanna og heilsumál kr. -0,5 mió.
- §3 Børn og ung kr. 4,5 mió.
- §4 Undirvísing kr. 1,8 mió.
- §5 Mentan og frítið kr. 0,1 mió.
- §6 Teknisk mál kr. -1,4 mió.
- §7 Umhvørvi kr. 4,5 mió.

Samla: (Avlop) kr. 11,0 mió

Mælt verður til at fíggja meirnýtsluna við flytingum innan hvørja grein sær ella av innistandandi.

**Lógargrundarlag: Kommunustýrislógin**

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2021 -flytan millum íløgu og rakstarjáttanir

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 25. november 2021:**
Einmælt samtykt við fyrru viðgerð –málið skal hava tvinnar viðgerðir

**Kommunustjórin og figgarleiðarin 10.12.2021**
Fíggjardeildin er liðug at gera upp rakstrar og íløgur í 2021 pr. 1 desember 2021, og er meirnýtsla á nøkum greinum:

Meirnýtsla er á greinum innan:

- §1 Kommunalafyrisitingin kr. 0,027 mió.
- §2 Almanna og heilsumál kr. 0,656 mió.
- §3 Børn og ung kr. 0,021 mió.
- §4 Undirvísing kr. 0,148 mió.
- §5 Mentan og frítíð kr. 0,756 mió.
- §6 Teknisk mál kr. 8,211 mió.
- §7 Umhvørvi kr. 0,553 mió.

Mælt verður til at fíggja meirnýtsluna við flytingum innan hvørja grein sær ella av innistandandi.

Roknskapurin fyri 2021 framroknað pr. 20. desember vísir avlop á kr. 14,5 mió. fyri rakstur og íløgur.

**Fíggjarnevndin 21. december 2021:**
Einmælt samtykt við seinnu viðgerð –málið er harvið endaliga viðgjørt og samtykt.

**Býráðið 21. december 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Fíggjarnevndini við seinnu viðgerð –málið er harvið endaliga viðgjørt og samtykt.

**88/21**
**21/00734-2 BHS Bú- og Heimatænastan í Suðuroy -Ársroknskapur 2020**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.12.2021 | 93/21 |
| 2 Býráðið | 21.12.2021 | 88/21 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 09.12.2021**
Umsitingin hevur hin 8. Desember 2021, móttikið teldutøkt avrit av Ársroknskapinum 2020 fyri BHS Bú- og Heimatænastan í Suðuroy.

Roknskapurin er granskoðaður av fyritøkuni Januar, Óðinshædd 13, Tórshavn, og er hesin greinaður í 3 PDF skjøl:

- 12425 2020 ALRO.pdf *"Bú- og Heimatænastan í Suðuroy –Ársroknskapur 2020"*
- 12425 2020 BP.pdf *"Grannskoðanarprotokoll frá 11. november 2021 (síðurnar 37 - 41)"*
- 12425 2020 P.pdf *"Grannskoðanarprotokoll frá 11. november 2021 (síðurnar 42 - 47)"*

**Niðurstøða um grannskoðanina og grannskoðanarátekning**
Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til tillaging av niðurstøðuni, áherðslur ella aðrar upplýsingar í grannskoðanarátekningina.
Um nevndin góðkennir ársfrásøgnina, sum hon fyriliggur, geva vit ársroknskapinum eina grannskoðanarátekning uttan tillaging av niðurstøðuni, áherðslur ella aðrar upplýsingar.

**6. Rakstur BHS**
Raksturin hjá samstarvinum skal við ársenda vísa kr. 0. Hetta inniber, at møguligt hall ella avlop verður útjavnað til luttakandi kommunurnar. Raksturin í 2020 gav eitt hall uppá kr. 1.378.005, sum verður innkravt sum niðanfyri víst:

| **Kommuna** | **Kr.** |
|---|---|
| Vágs kommuna | 290.347 |
| Tvøroyrar kommuna | -53.259 |
| Hvalbiar kommuna | 158.374 |
| Fámjins kommuna | 233.575 |
| Hovs kommuna | 290.395 |
| Porkeris kommuna | 520.786 |
| Sumbiar kommuna | -62.213 |
| | **1.378.005** |

**Inntøkur BHS**
Samlaðu inntøkurnar í 2020 eru kr. 66.522.729, sundurgreinað soleiðis:

| | |
|---|---|
| Vágs kommuna | 17.690.347 |
| Tvøroyrar kommuna | 21.902.335 |
| Hvalbiar kommuna | 8.618.374 |
| Fámjins kommuna | 1.749.596 |
| Hovs kommuna | 1.490.395 |
| Porkeris kommuna | 4.600.786 |
| Sumbiar kommuna | 4.859.985 |
| Brúkaragjøld | 5.552.533 |
| Vørusøla og onnur søla | 58.378 |
| Flytingar frá landinum | 0 |
| | **66.522.729** |

*Luttakandi kommunurnar gjalda inn til samstarvið sambært §10 í løgtingslóg um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m., ið ásetur, at kommunurnar býta útreiðslurnar samsvarandi tali av borgarum, ið pr. 31. desember árið fyri, eru 67 ár og eldri.*
*Viðvíkjandi brúkaragjøldum eru hesi innkravd sambært kunngerð um heimatænastu og gjald fyri heimatænastu, eldrarøkt o.a. eftir § 2, 3, 4 og 5 í kunngerðini.*

**Starvsfólkakostnaðir BHS**
Starvsfólkakostnaðirnir eru í 2020 kr. 52.486.225, sum svarar til 78,9% av samlaðu útreiðslunum hjá samstarvinum uppá kr. 66.522.729.

**Aðrir kostnaðir**
Aðrir kostnaðir hjá samstarvinum eru í 2020 kr. 14.036.504.
Í 2019 vóru 1,8 mill.kr. bókaðar í rakstrinum undir kontuni "stuðul til annað virksemi". Talan er um leiguútreiðslur fyri heimini í Hvalba, Hamragarði og Vági, sum ikki varð fult innroknað í 2017, samsvarandi leigusáttmálum.

**Lógargrundarlag:**

- Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (Kommunustýrislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003
    - Kapittul 8 Fíggjarumsiting

      § 38. Fíggjarnevndin tekur sær av beinleiðis umsitingini av málum, ið viðvíkja kassa- og roknskaparverki og lønar- og starvsfólkaviðurskiftum kommununar.

      Stk. 4. Áðrenn mál viðvíkjandi fíggjarviðurskiftum og fyrisitingarligum viðurskiftum verða løgd fyri kommunustýrið, skal fíggjarnevndin geva sítt ummæli.

- Løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
    - § 10. Tær kommunur, ið samstarva um at røkja heimatænastuna, eldrarøkt v.m. sambært § 4, verða eisini at býta tær útreiðslur, ið standast av at røkja uppgávuna, sínámillum. Hesar kommunurnar býta útreiðslurnar samsvarandi við talið av borgarum, ið 31. desember árið fyri eru 67 ár og eldri.

- Rundskriv nr. 9003 frá 15. februar 2017 um uppgerð av ársroknskapum hjá samstørvum um heimatænastu, eldrarøkt v.m. og um mannagongdir fyri innrapporteringum um ársskiftið

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2021** –2.21.61.802 Eldrarøkt, Gjøld til eldrasamstarvið
Tvøroyrar kommuna av ber á hvørjum ári uml. 37% av samlaða rakstrarkostnaðinum hjá BHS, samb. §10 LL. 20. um kommunalt samstarv um eldrarøkt v.m.

**Parturin hjá Tvøroyrar er sum niðanfyri víst:**

| **Ár** | **2019** | **2020** | **2021** | **2022** |
|---|---|---|---|---|
| Avsett kr. FÆ | 18.563.000,- | 20.992.000,- | 20.752.932,- | 22.389.000,- |
| Roknskapur | 21.829.000,- | 21.891.000,- | | |

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**<u>Fíggjarnevndin 21. december 2021:</u>**
Einmælt samtykt

**<u>Býráðið 21. december 2021:</u>**
Einmælt samtykt

**89/21**

## 21/00738-1 BHS -Fíggjarætlan 2022 fyri Bú- og Heimatænastuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.12.2021 | 94/21 |
| 2 Býráðið | 21.12.2021 | 89/21 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 09. Desember 2021**

Fíggjarætlan 2022 fyri Bú-og Heimatænastuna til viðgerðar.

| Konta | Rakstrarstað | Roknaskapur 31.10.2021 | Framroknað 31.12.2021 | Ætlan 2022 31.12.2022 | Nota |
|---|---|---|---|---|---|
| 11 | Lønir | 45.797 | 54.956 | 56.330 | 1 |
| 14 | Keyp av vørum og tænastum | 5.520 | 6.624 | 6.700 | |
| 15 | Keyp av útbúnaði | 468 | 561 | 500 | |
| 16 | Leiga, viðlíkahald | 590 | 708 | 700 | |
| 19 | Ymsar rakstrarútreiðslur | 68 | 81 | 100 | |
| 52 | Ansingarsamsýning | 654 | 785 | 800 | |
| 54 | Stuðul til annað virksemið | 6 | 7 | 7 | |
| 71 | Leiguútreiðslur | 3.270 | 3.925 | 3.925 | |
| 75 | keypsmavg | 305 | 366 | 375 | |
| 21 | Søla av vørðum og tænastum | -4.948 | -5.937 | -6.000 | |
| 78 | Inntøka Almannaverkið | -224 | -224 | 0 | 2 |
| | | 51.506 | 61.852 | 63.437 | |
| | Cosmic | | | 368 | |
| | **Úrslit** | | 61.852 | 63.805 | |

| **Býtt út á kommunur** | **67+** | **%** | |
|---|---|---|---|
| Hvalba | 134 | 14 | **9.047** |
| Tvøroyri | 339 | 36 | **22.889** |
| Fámjins | 29 | 3 | **1.958** |
| Hov | 23 | 2 | **1.553** |
| Porkeri | 74 | 8 | **4.996** |
| Vág | 273 | 29 | **18.433** |
| Sumba | 73 | 8 | **4.929** |
| | 945 | 100 | **63.805** |

**Nota 1.**
*Roknað er við eini lønar- og anciennitetshækking uppá 2,5%*

**Nota 2.**
*Serstøk inntøka fyri 2021 sum væntandi ikki kemur fyri aftur í 2022*

**Lógargrundarlag:**

- Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (Kommunustýrislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003
    - Kapittul 8 Fíggjarumsiting
      § 38. Fíggjarnevndin tekur sær av beinleiðis umsitingini av málum, ið viðvíkja kassa- og roknskaparverki og lønar- og starvsfólkaviðurskiftum kommununar.

      Stk. 4. Áðrenn mál viðvíkjandi fíggjarviðurskiftum og fyrisitingarligum viðurskiftum verða løgd fyri kommunustýrið, skal fíggjarnevndin geva sítt ummæli.

- Løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
    - § 10. Tær kommunur, ið samstarva um at røkja heimatænastuna, eldrarøkt v.m. sambært § 4, verða eisini at býta tær útreiðslur, ið standast av at røkja uppgávuna, sínámillum. Hesar kommunurnar býta útreiðslurnar samsvarandi við talið av borgarum, ið 31. desember árið fyri eru 67 ár og eldri.

- Rundskriv nr. 9003 frá 15. februar 2017 um uppgerð av ársroknskapum hjá samstørvum um heimatænastu, eldrarøkt v.m. og um mannagongdir fyri innrapporteringum um ársskiftið

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2021** –2.21.61.802 Eldrarøkt, Gjøld til eldrasamstarvið
Tvøroyrar kommuna av ber á hvørjum ári uml. 36% av samlaða rakstrarkostnaðinum hjá BHS, samb. §10 LL. 20. um kommunalt samstarv um eldrarøkt v.m.

**Parturin hjá Tvøroyrar er sum niðanfyri víst:**

| **Ár** | **2019** | **2020** | **2021** | **2022** |
|---|---|---|---|---|
| Avsett kr. FÆ | 18.563.000,- | 20.992.000,- | 20.752.932,- | 22.389.000,- |
| Roknskapur | 21.829.000,- | 21.891.000,- | | |

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

<u>**Fíggjarnevndin 21. december 2021:**</u>
Einmælt samtykt

<u>**Býráðið 21. december 2021:**</u>
Einmælt samtykt

**90/21**
**21/00382-2 Posta -Leigusáttmáli um avgreiðslubyggning matr.nr. 374 í miðbýnum (Posta-bygningurin)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.04.2021 | 16/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.06.2021 | 8/21 |
| 3 Býráðið | 16.06.2021 | 14/21 |
| 4 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 69/21 |
| 5 Býráðið | 28.10.2021 | 66/21 |
| 6 Fíggjarnevndin | 21.12.2021 | 95/21 |
| 7 Býráðið | 21.12.2021 | 90/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 13.04.2021)**
Posta –Janus Rasmussen- hevur vent seg til kommunustjóran, við ynskið um fund 12. Apríl, at viðgera leigusáttmálan millum Tvøroyrar kommunu og Posta av avgreiðsluhølinum á Sjógøtu 2.

Posta hevur leiga frá Tvøroyrar kommunu í árini 2019 og 2020 alla niðari hæddina, men ynskir frá 2021 at minka um leigumálið, frá 225m$^2$ til 173,5m$^2$. Tvs. at avgreiðsluhøli ikki verður partur av leigumálinum.

Kommunustjórin mælir til at ganga umsóknini á møti, og at nýggjur leigusáttmáli verður gjørdur millum Tvøroyrar kommunu og Posta, galdandi frá 01.01.2021. -Hetta tó treyta av, at leigugjøld fyri 2019 og 2020 fyrst verða avgreidd.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2021:**
Einmælt samtykt at takan undir við uppskotinum at leiga Posta 173,M$^2$, tó treya av øll eftirstøða fyri árini 2019 og 2020 er goldin

**Fíggjarnevndin 14. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

**Býráðið 16. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað –Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá umsitingini.

**Kommunustjórin 20 juli 2021:**
Posta og umsitingin hjá Tvøroyrar kommunu hava ikki verði samd um hvussu gjaldast skal fyri el og hita árini 2019 og 2020, har í sáttmálanum er ásett, at leigarin rindar umframt leigugjald fyri el og hita.

Posta hevur hildi hesar útreiðslur fram til 2019, tá Posta var einsamalt í bygninginum. Men tá Posta flytur úr ovari hæddini, -og eftir at eftirskúlin byrjar sítt virksemið í bygninginum-, metur Posta tað ikki vera rætt, at Posta ber allan kostnaðin av el og hita fyri árini 2019 og 2020.

Umsitingin mælir til semju, har Tvøroyrar kommuna og Posta bera ½ av kostnaðinum fyri el og hita fyri árini 2019 og 2020, og at Posta pr. 1. januar 2021 ber kostnaðin fyri el og hita samsvarandi við ferðmetrarnir, sum Posta leigar lutfallið 171/283 lutfalli av samlaða leigu vídd m2, ið verður uppgjørt árliga, samsvarandi galdandi og dagførdan leigusáttmála millum Tvøroyrar kommunu og Posta av Sjógøtu 2.

**Kommunustjórin 21. Okt. 2021.**
Eftir nógv samskiftið við Posta, har umsitingin hjá Tvøroyrar kommunu og leiðslan hjá Posta vóru komin ásamt um, hvussu Posta kann innrætta seg í bygninginum á Sjógøtu 2, nú stóra avgreiðslu hølini ikki longur ynskjast at vera leiga av Posta.

Nýggir leigusáttmáli er gjørdur, har hædd verður tikið fyri gjald av el og hita í lutfallið við fermetrarnir leiga verður. Og partarnir eru samdur um útreiðslurnar fyri el og hita árini 2019 og 2020, vera deildar 50/50 millum Posta og TVK.

Kortini vil stjórin á Posta ikki gjalda leigu av avgreiðsluhølini longur enn til 1. Januar 2021, og hevur broytt leigusáttmálan samsvarandi. (Posta hevur annars virka í allari niðari hæddina á Sjóðgøtu 2, fram til 1. Sep. 2021, tá Posta flutti úr avgreiðsluhølinum )

At taka støðu til hjá figgjarnevndini er um nýggi leigusáttmálin við Posta skal vera galdandi frá:

- 1. Januar 2021
  1. Aug. 2021

__Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:__
Fíggjarnevndin samtykkir einmælt, at verandi sáttmálin við POSTA skal vera at byrja frá 1. aug. 2021. Um Posta ikki góðtekur hesa áseting innan 30. november 2021, verður Posta uppsagt pr. 1. januar 2022

__Býráðið 28. oktober 2021:__
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini.

__Kommunustjórin 03.12.2021__
Staðfest er d.d. at Posta __ikki__ hevur góðtikið leigusáttmálan av Sjógøtu 2. -Kommunustjórin hevur sent stjóranum á Posta áminning 22.11.2021 um at góðkenna og undirskriva leigusáttmálan. Stjórin á Posta Joel undir Leitinum svarar 22.11.2021, at hann ikki góðtekur leigusáttmálan.

Ósemjan er um nýggja leigumálið skal byrja 1. Januar 2021 ella 1. August 2021.

Posta heldur uppá at nýggja leigumálið skal byrja 1. Januar meðan Tvøroyrar kommuna heldur uppá at nýggja leigumálið skal byrja 1. August 2021.

Munurin á hesum dagfesting er tann, at Posta hevur frammanundan leigusáttmála við TVK, har Posta hevur leiga alla niðari hæddina á Sjógøtu 2. Men Posta hevur vent seg til Tvøroyrar kommunu fyri at fáa avslag í leigu prísinum, og ynskið um at flyta út úr avgreiðsluhølinum, og fáa loyvið til at innrætta seg øðrvísi á minni ferðmetrum.

Hetta hevur TVK loyvt og játta Posta at gera, og er leiguprísurin farin frá kr. 825,-/m2 til kr. 600,-/m2. Eisini hevur Posta fingið loyvið til at innrætta seg á minni ferðmetrum, og at broyta smávegis uppá bygningin.

Men við tað at Posta ikki er flutt út úr avgreiðsluhølinum fyrr enn í sep. 2021, metur TVK, at Posta skal rinda leigu fyri brúk av avgreiðsluhølinum fram til 1. Aug. 2021. Avgreiðsluhølið er uml. 75m2 til støddar og leigugjaldið fyri hetta (jan.-aug.) 8. Mnd. er (600x75x8/12) kr. 30.000,-

**Til støðutakan er:**

1. Um at halda fast við at uppsiga leigusáttmálan við Posta av Sjógøtu 2 pr. 31. Desember 2021 orsakað av at Posta ikki vil góðtaka dagfestingina á leigusáttmálanum.
2. Samráðast um eina semja har Posta og Tvøroyrar kommunu t.d. deila 50/50 leigugjaldið á kr. 30.000,-, ið er gjald fyri leigu av avgreiðsluhølinum í 8. mnd. av 2021.

**<u>Fíggjarnevndin 21. december 2021:</u>**
Einmælt samtykt at halda fast við at uppsiga leigusáttmálan við Posta av Sjógøtu 2 pr. 31. desember 2021 um eftirstøðan fyri avgreiðsluhølini ikki er goldin innan 31.12.2021.

**<u>Býráðið 21. december 2021:</u>**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Fíggjarnevndini.

**91/21**
**21/00749-1 Tilbúgving -keyp av vatn tangabili**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.12.2021 | 100/21 |
| 2 Býráðið | 21.12.2021 | 91/21 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 14.12.2021**
Tilbúgvingarnevndin mælir til á fundi hin 23. Nov.2021 at tørvandi útbúnaður verður keyptur til felags tilbúgvingina í Suðuroynni fyri stuðulsjáttanina frá Betri Stuðulsgrunninum, fyri at styrkja um førleikarnar hjá tilbúgvingini at bjarga og fyribyrgja. Hægsta raðfesting á tørvandi útbúnaði, er útvegan av einum 10. uml. ton. vatntangabili samb. Átaksleiðaranum.

**Lógargrundarlag: kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar: -ongar**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 21. december 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá tilbúgvingar og brunanevndini.

**Býráðið 21. december 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Fíggjarnevndini

**92/21**
**21/00718-1 Trongisvágsskúli & Ítróttarhøllin -hitaskipan (Oljufýr / Oljuketil)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 07.12.2021 | 114/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.12.2021 | 86/21 |
| 3 Býráðið | 21.12.2021 | 92/21 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 7. desember 2021**
Forkv. í mentanarnevndini ynskir at mentanarnevndin tekur upp málið viðv. hitakelduni (oljufýr/oljuketil) í Trongisvágs skúla og Ítróttarhøll til viðgerðar. Orsøkin er, at talan er stórt sæð um somu hitaskipan, sum hevur virka síðan bygt var í 1982.

Kommunustjórin hevur í dag tosa við umsjónarmanninum, Kjarta Johannesen, sum upplýsir, at tosa hevur verði í fleiri ár um at útskifta gomlu hitaskipanina við nýggjari og tíðarhóskandi orkusparandi hitaskipan.

Eisini hevur kommunustjórin vent seg til Effo, sum er veitari av olju. Upplýst verður, at miðal oljunýtslan seinastu 5 árini hevur verði áleið 50.000 litur/ár, svarandi til kr./ár 280.000,- inn. MVG (2021 prísir)

Og kommunustjórin hevur tosa við umsjónarmanninum í skúlanum á Giljanesi Finnur Vang, sum upplýsir, at nýggi skúlin á Giljanesi verður upphitaður við oljuketlum, og at miðal oljunýtslan liggur millum 30-33/litur/dag. Tvs. uml. 11.500 litur/ár. Her skal tó havast í huga, at talan er um nýggjan skúla við høgari bjálving og tíðarhóskandi orkukarmi.

**Lógargrundarlag: Kommunusfulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar:** Meting kr. 333.000,- –ongin serstøk játtan er avsett á FÆ2021

Ein veitari hevur innlatið tilboð í 2011 og aftur í 2019, har veitarin metur, at stór sparing fæst við at útskifta gomlu ketlarnar, við nýggjar lágtemperatur oljuketlar.
Mett verður at sparingin verður 7.755 litrar árliga. Og alt eftir oljuprísi og evt. avsláttri er hetta góðar 50.000 kr í sparing árliga.

Veitarin upplýsir at Hardware partin kann veitast fyri kr 223.000 kr + mvg.. Hetta er íroknað frakt til staðið....Hesin prísurin hækkar 5.4 % 1 januar 2022.

Torført at meta um hvat avmontering, montering, el, tilfar o.a. kostar. Tað er alt eftir hvør ger tað og hvussu vanir teir eru við tílíkar uppgávur. Eitt boð kundi verið 110.000 kr + mvg. Veitarin metur ikki, at nakar ger slíka uppsetan fyri fastan prís.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndin og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 07. december 2021:**
Einmælt samtykt at seta arbeiði í gongd at skifta ketlar í inniverandi ári sambart tilboð. Málið verður beint í fíggjarnevndina við tilmæli um at fíggja hetta av játtanini avsett FÆ2021 til nýggjan skúla.

**Fíggjarnevndin 21. december 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini. –málið verður beint í býráðið

**Býráðið 21. december 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Fíggjarnevndini.

**93/21**
**21/00751-1 Býráðsskrivstovan -dagføring av kaffi- og matstovu**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.12.2021 | 102/21 |
| 2 Býráðið | 21.12.2021 | 93/21 |

**Málslýsing:** Kommunustjórin 14. desember 2021
Mælt verður til at dagføra kaffi- og matstovuna í býráðsskrivstovuni, við m.a. at viðkað um støddina á hølinum, leggja nýtt á gólv og loft og at uppseta ein køk, soleiðis at starvsfólk fáa betri umstøður at matgerða og at taka ímóti vitjandi.

**Lógargrundarlag: -kommunufulltrúin**

**Fíggjarligar avleiðingar:** Mettur kostnaður kr. 150.000,- sum verður játta av FÆ2021, §115 kommunufyrisitingin íløgur, har avsett eru kr. 851tkr. –Saldo §115 d.d. kr. 693tkr.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 21. december 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá kommunustjóranum.

**Býráðið 21. december 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini og kommunustjóranum.

**94/21**

**20/00302-11 Umsókn um byggiloyvi til íbúðir á matr. nr. 208av - Bústaðir - MTV**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 15.09.2021 | 50/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.12.2021 | 88/21 |
| 3 Býráðið | 21.12.2021 | 94/21 |

**Málslýsing:**
MTV-Byggivirkið søkir vegna Bústaðir um byggiloyvi til 8 íbúðir á matr. nr. 208av og 208v í Heiðatrøðini.
Matr. nr. 208v er ogn hjá Tvøroyrar Kommunu, og helst má fremjast marknaumskipan, soleiðis at eingin bygningur stendur á tveimum matriklum.

Byggisamtykt: Øki B1: Bústaðarøki

1) Í økinum mugu bert verða bygd fríttliggjandi sethús við upp til 2 íbúðum, og eftir serstøkum loyvi frá byggimyndugleikanum tví-, rað- og ketuhús, bólkahús og líknandi.

Vit hava fingið umsóknartilfar sum yvirhøvur er gott og nøktandi, tó eru fylgjandi manglar:

- Skjalprógv fyri orkuútrokningar
- Inniluft - Slag av skipan / Dimensjónering av luftskiftinum
- Staðseting av trygdarglasi (lamineráð innan, krav tá ið vindeygur/glashurðar eru niður til gólvið.)

**Tilmælið:**
Mælt verður til at lata byggiloyvi, treytað av, at kommunan fær omanfyristandi manglandi upplýsingar.
Samstundis verður mælt til, at fremja marknaumskipan millum 208av og 208v.

**Tekniska nevnd 15. september 2021:**
Einmælt samtykt at lata byggiloyvi, treytað av, at kommunan fær omanfyristandi manglandi upplýsingar.
Samstundis verður mælt til, at fremja marknaumskipan millum 208av og 208v.
Fáa viðurskiftini viðvíkjandi 208v uppá pláss.

**Tilmæli 16. desember 2021 Lasse Jensen:**
Spurningurin fíggjarnevndin skal taka støðu til, er um Bústaðir /MTV skal sleppa at gera omankoyring á matr. nr. 208v, sum er kommunal ogn.
Eftir ætlanini verða uml. 5m tiknir av stykkinum til veg, sum framvegis verður ogn hjá Tvøroyrar Kommunu.

**Fíggjarnevndin 21. december 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Teknisku deild frá 16. desember 2021. Og at Bústaðir ber kostnaðin av vegaføringini. Fíggjarnevndin mælir einmælt til, at samskift verður við FK um atkomu.

**Býráðið 21. december 2021:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Fíggjarnevndini.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

**95/21**
**21/00742-2** [redacted]

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | | |
| 2 Býráðið | 21.12.2021 | 95/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.12.2021 | 101/21 |

[redacted]

TVØROYRAR KOMMUNA

[redacted]

Til kunningar

**35/21**
**21/00035-1 Skattatøl 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.01.2021 | 1/21 |
| 2 Býráðið | 28.01.2021 | 2/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.02.2021 | 2/21 |
| 4 Býráðið | 01.03.2021 | 4/21 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.04.2021 | 4/21 |
| 6 Býráðið | 26.04.2021 | 8/21 |
| 7 Fíggjarnevndin | 20.05.2021 | 5/21 |
| 8 Býráðið | 27.05.2021 | 9/21 |
| 9 Fíggjarnevndin | 14.06.2021 | 7/21 |
| 10 Býráðið | 16.06.2021 | 12/21 |
| 11 Fíggjarnevndin | 23.08.2021 | 9/21 |
| 12 Býráðið | 26.08.2021 | 20/21 |
| 13 Fíggjarnevndin | 27.09.2021 | 10/21 |
| 14 Býráðið | 30.09.2021 | 25/21 |
| 15 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 14/21 |
| 16 Býráðið | 28.10.2021 | 29/21 |
| 17 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 15/21 |
| 18 Fíggjarnevndin | 21.12.2021 | 17/21 |
| 19 Býráðið | 21.12.2021 | 35/21 |

**Málslýsing: Samanbering av skattainntøkum í 2021**

**Kommunustjórin 01.03.2021**
- Til kunningar/umrøðu eru samanberingar av skattainntøkum

**Býráðið 01. marts 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Kommunustjórin 20.04.2021.**
Til kunningar/umrøðu eru samanberingar av skattainntøkum 2020/2021 (jan-mars)

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 26. apríl 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Kommunustjórin 15.05.2021.**
Til kunningar/umrøðu eru samanberingar av skattainntøkum 2020/2021 (jan-apr)

**Fíggjarnevndin 20. maj 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 27. maj 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 14. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 16. juni 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 26. august 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Kommunustjórin 2. september 2021.**
Samanbering av skatti 2020/2021 –jan aug.

**Fíggjarnevndin 27. september 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað, málið verður beint í býráðið

**Býráðið 30. september 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 18. november 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 21. december 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 21. december 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**36/21**
**21/00376-18 Umsókn um byggiloyvi í Heiðatrøðini**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.12.2021 | 69/21 |
| 2 Býráðið | 21.12.2021 | 36/21 |

**Málslýsing:**
Andreas Sumberg og Maria Joensen hava søkt um byggiloyvi á matr. nr. 208am í Heiðatrøðini.

**Tilmæli:**
Umsóknartilfarið er fullfíggjað, og mælt verður til at lata byggiloyvi

**Tekniska nevnd 06. december 2021:**
Nevndin er kunnað.

**Býráðið 21. december 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**37/21**

**21/00511-2 Suðuroyar sløkkilið -Umsokn um stuðul til keyp av útbúnaði send Betri Trygging 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tilbúgvingarnevndin (Brunanevndin) | 23.11.2021 | 1/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.10.2021 | 13/21 |
| 3 Býráðið | 28.10.2021 | 32/21 |
| 4 Fíggjarnevndin | 21.12.2021 | 18/21 |
| 5 Býráðið | 21.12.2021 | 37/21 |

Málslýsing og fundarfrágreiðing

**Málslýsing:** Tilbúgvingarleiðarin fyri Norðara helvt og tilbúgvingarleiðarin fyri Sunnara helvt hava hin 7 juli 2021 sent Betri stuðulsgrunninum umsókn um stuðul til keyp av tangabili.

**Kommunustjórin 20. Okt. 2021**
Til kunning hevur Nevndin fyri Betri Stuðul á fundi gjørt av at ganga umsóknini frá felagstilbúgvingini í Suðuroy á møti og stuðlar við 800.000 kr.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 28. oktober 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Tilbúgvingarnevndin (Brunanevndin) 23. november 2021:**
Kristin greiddi frá at Betri Stuðulgrunnurin hevði játta kr. 800.000,- í stuðul, eftir umsókn frá átaksleiðaranum í Sunnari- og norðari helvt í Suðuroynni.

Kristin Michelsen spyr Anfinn Leo, um átaksleiðararnir hava tosa saman um hvat stuðulsupphæddin skal brúkast til.

Anfinn Leo mælir til at brúka stuðulsjáttanina frá Betri Trygging til keyp av vatntangabili á 10.ton, ið kostar í mesta lagið kr. 800tkr. -**Hetta er einmælt samtykt av tilbúgvingarnevndini.**

**Annað: (kunning frá luttakarum)**
Anfinn Leo átaksleiðari upplýsti at:

- Ongin brandpostur er á Krambatanga.
  - **Nevndin samtykti einmælt, at Átaksleiðarin heitir á LV um at fáa uppsett brandpost á Krambatanga.**

- Tilbúgvingarnevndin mælir til at ein átaksvognur verður keyptur, sum verður staðsettur at vera í Fámjin kommunu -Einmælt samtykt at átaksleiðarin kannar nærri hvør tørvur er við atliti til nýggja tunnilin. Og at átaksleiðarin fyri fyrst fremur eftirlit á sløkki útgerðina sum er í Fámjin. Máli verður tikið upp á einum seinni fundi tá meira kunning er um tunnilin til Fámjin.

- Tilbúgvingarnevndin mælir til at ein átaksbilur verður keyptur, sum verður staðsettur at vera í Hvalbiar kommunu, og at allar kommunur gjalda samb. samstarvsavtaluni. Átaksleiðarin hevur innheinta tilboð uppá ein hóskandi átaksbil fyri í mesta lagið kr. 300.000,- ink. MVG. **Einmælt samtykt, og verður tilmælið lagt til samtyktar hjá hvørjari kommunu sær.**

- Anfinn Leo kunnar um at brandmenn í Hvalba hava tørv á eitt stað til at goyma lætta útgerð, klæðir o.a. Talan er um 6 mans. -**Samtykt at Ronnie kannar hetta til næsta fund.**

- Anfinn Leo kunnar um at Jossette Jennings ikki er partur av brunaliðnum longur

- Anfinn kunnar um flutning av mors. -har SS hevur heitt á Átaksleiðaran um at flyta mors. Anfinn kunnar um at hetta er vent á deildini í norðari- og sunnari helvt, og samanlagt er 5 persónar á hvørjum staði, sum eru til reiðar at átaka sær uppgávuna.

- Johannes Magnussen mælir til at fundur verður millum Politi, Ambulansatænastan og form í átaksnevndini um flutningin av mors. –**Einmælt samtykt at form. Átaksnevndini Kristin Michelsen heitur á Politi og Sjúkrahús um ein fund hesum viðvíkjandi.**

- Kristin Michelsen gerðir frá, at uppgerð er ávegis til allar kommunurnar við. keypinum av nýggju brunastøðini, har samtykt er, at allar kommunurnar í samstarvinum gjalda samb. samstarvsavtaluna.

- Kristin Michelsen greiðir frá, at stjórin á LV hevði steðgað stuðulsjáttanina, sum Jákup Olsen Samskipari fyri tilbúgving, Infrakervi hjá LV, annars hevði fráboðað var játta til keyp av ymiskari serútgera til Hvalbiartunnulin. **Einmælt samtykt at tilbúgvingarnevndin sendur eitt skriv til LV, við áheitan um at játta stuðul til m.a. sløkjuútgerð til Hvalbiar tunnilin.**

- Claus Olsen kunnar um at bjargingarfelagið tørvar játtan til rakstur, og hevur søkt allar kommunur um stuðul. Bjargingarfelagið hevur rykt út ialt 18. ferðir seinasta árið.

**Fíggjarnevndin 21. december 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 21. december 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvøråvegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

**38/21**
**21/00694-1 SEV -Aðalfundur 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.11.2021 | 76/21 |
| 2 Býráðið | 21.12.2021 | 38/21 |

**Málslýsing:** Kommunustjórin 22.11.2021
Fundarboð til eykaaðalfundin 26. november 2021 kl. 9:30, Hotel Føroyar

**Lógargrundarlag:** Viðtøkurnar fyri SEV. -Hægsta vald í felagnum hevur aðalfundurin. Á aðalfundi møta limakommunurnar, sum hvør sær hava eina atkvøðu fyri hvørt byrjað 1000 íbúgvaratal. Áðrenn limafundin lata kommunurnar inn fulltrúarváttan, har sagt verður frá, hvør umboðar tær.
https://www.sev.fo/um-okkum/sev-folksins-ogn/vidtokur/

**Fíggjarligar avleiðingar: ongar**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 25. november 2021:**
Einmælt samtykt at Borgarstjórin Kristin Michelsen fær atkvøðurætt á eykaaðalfundinum hjá SEV.

**Býráðið 21. december 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað.

Fundurin lokin kl. 18:45

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen